# Tvey ár gjørdust til fýrati

**Frode Jensen kom av Bornholm til Føroya sum sersjantur tann 3. mai í 1964. Hann skuldi vera her í tvey ár. Men hann fann konu sína her og fekk familju. Mánadagin 3. mai flyta tey til Danmarkar at búgva – júst 40 ár seinni**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Mánadagin flytur Frode Jensen av landinum til Danmarkar eftir at hava búð her í 40 ár. Hann skuldi upprunaliga bara vera í Føroyum í tvey ár*

Frode Jensen var 20 ára gamal, tá hann kom til Føroya við Tjaldrinum í 1964. Hann skuldi arbeiða í Mjørkadali í tvey ár, og so var ætlanin at fara aftur til Danmarkar.

Men lagnan vildi tað øðrvísi. Frode hitti eina gentu, tey gjørdust góð og seinni giftust tey.

Hann setti búgv í Havn og saman fingu tey trý børn, sum øll eru vaksin í dag.

Frode og konan hava onkuntíð tosað um at flyta til Danmarkar, men tað er ikki blivið til nakað fyrr enn nú.

Og púra tilvildarliga vildi tað soleiðis til, at tey flúgva úr Føroyum 3. mai. Júst 40 ár eftir, at Frode kom til landið sum blaðungur sersjantur.

### Øll familjan flytur

Børnini hjá Frode og Gunvør eru øll vaksin. Hóast tað so flyta øll niður.

– Tað er faktiskt børnini, sum gera, at vit eisini fara. Eldri sonurin býr niðri, dóttirin við familju flytur, og tann yngsti skal niður í lestrarørindum, so vit fara aftaná, kann sigast sigur Frode við einum smíli.

Vit eru stødd upp á hotel Føroyum til ein kaffimunn og prát. Frode hyggur út gjøgnum vindeygað og nýtur útsýnið yvir Havnina. Helst fyri seinastu ferð frá hotellinum, meðan hann er búsitandi í Føroyum.

Tey gleða seg nógv at koma upp á pláss í Danmark. Tey hava keypt eini hús í Bording, sum liggur í millum Ikast og Silkeborg. Um 6.000 íbúgvar búgva í Bording, so Frode og konan flyta í ein minni bý samanborið við Havnina. Men tað stúrir hann ikki fyri. Bording hevur alt, sum tey halda seg hava tørv á. Og um okkurt annað skuldi verðið átrokandi, so er einans eitt korter til Silkeborg.

### Kokkur

Eftir at hava arbeitt í Mjørkadal í nøkur ár, fór Frode út at sigla. Hann slapp við einum rækjutrolara, og tá varð hann spurdur, um hann vildi verða kokkur. Og honum dámdi so mikið væl sjómanslívið, at hann helt á í meira enn 20 ár. Í 1980 fór hann umborð á Smyril at arbeiða eisini sum kokkur.

Har var hann í trý ár. Og seinni var hann ikki minni enn 18 ár umborð á Bliki og Lómi sum hovmeistari.

Frode fór í land at arbeiða sum kokkur í 2001, har hann millum annað arbeiddi í Galluni á Sjómansheiminum eitt tíðarskeið. Og ta seinastu tíðina arbeiddi hann í handlinum hjá Jóhannes Andreasen á Grønlandsvegnum, har hann takkaði fyri seg fyri nøkrum døgum síðani.

Frode sigur, at hann hevur fingið avtalur niðri til samrøður, har hann hevur søkt arbeiði sum kokkur.

– Onki liggur fast enn, men eg vænti ikki, at tað verður so torført at fáa arbeiði, sigur hann.

### Nógv broytt

Frode tosar um, hvussu nógv Føroyar eru broyttar, síðani hann kom higar fyri 40 árum síðani.

– Tað er ótrúligt, hvussu stór Havnin er blivin, sigur hann og yppir øksl.

Hjúnini síggja tað sum eina stóra avbjóðing at flyta til Danmarkar, men tey gleða seg avbera nógv.

Frode ásannar, at tað verður løgið at koma aftur til Danmarkar at búgva. Hann hevur systkin niðri, sum hann hevur havt nógv samband við. Foreldrini misti hann sum barn, og tað var eisini tað, sum gjørdi, at hann vildi royna at arbeiða í Føroyum í eina tíð.

– Eg var so ungur, og eg bleiv biðin at verða sersjantur. Tað kann man ikki nokta, so eg helt, at eg kundi tað sama uppliva nakað. Og tað vísti seg so at verða ein týdningarmikil avgerð, sum eg tók tá, greiðir hann frá.

### Gomul í Danmark

Kaffikoppurin er við at tømast nú, og Frode ressast í stólinum. Hann má heim at pakka víðari. Bingjan í túninum skal fyllast, og hóast mest sum alt er fylt í flytikassar, so er framvegis nógv eftir at tøma í húsinum.

Gunvør helt fyri, at ein sær ikki, hvussu nógv ein eigur fyrr enn ein skal flyta. Tey hava búð í húsinum á Fjalsgøtu í 19 ár, men mánadagin 3. mai gongur leiðin til Danmarkar, har tey skulu búgva framyvir.




*Frode Jensen sigur, at av øllum tí góða, sum er í Føroyum, verður tað náttúruna, hann mest fer at sakna. Hinvegin sigur hann flennandi, at hann ikki fer at sakna veðurlagið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

38 ár seinni enn Frode sum 20 ára gamal hevði hugsað sær.

Spurdur um tey koma aftur, sigur Frode, ja, púra avgjørdur.

– Men bara at ferðast, vit koma neyvan aftur at búgva í Føroyum, er eitt tað seinasta hann sigur, áðrenn hann fer út úr hotellinum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



*Nøkur av listafólkunum sum sýna fram í Smiðjuni: f.v.Vilhelm Andreasen, Susanne Nielsen, Ólavur Reinert, Arngerð Joensen, Durita Hansen og Ankey Joensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Listaframsýning í Smiðjuni í vikuskiftinum

Fríggjadagin 30. apríl læt ein listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Talan er um málningar, vatnlitsmyndir, keramik og collage.

Tað er Arngerð Joensen í Hoyvík sum stendur fyri framsýningini. Tey sum sýna fram eru umframt Arngerð eisini næmingar í Hoyvíkar Listaskúla, tey eru: Hervør Hergudóttir, Inga Samuelsen, Vilhelm Andreasen, Ólavur Reinert, Ankey Joensen og Susanne Nielsen

Arngerð hevur arbeitt við list í umleið 40 ár. Hon er útbúgvin innandura arkitektur og lærari og hevur privata undirvísing í list ymsastaðni í Føroyum.

Í eini 20 ár hevur búði hon í Danmark. Hon hevur spesialiserað seg í innrætting av køkum og hevur arbeitt innan hetta øki bæði í Danmark og í Føroyum.

Framsýningin er bert opin í vikuskiftinum, fríggjadag, leygardag og sunnudag, allar dagarnar frá kl. 14-20

Sonja Dalsgaard, Skálavík:

## 25 ára starvsdag á Eirargarði

1. mai 2004 hevur Sonja Dalsgaard í Skálavík 25 ára starvsdag á Eirargarði B 16 í Havn.

Sonja, f. Hansen, er úr Havn og vaks upp í Sandavági. Sum 15 ára gomul fór hon til Skopunar at tæna hjá Andreasi Johannesen (Andreasi í Hvannasundi).

Hon giftist við Tønner Dalsgaard úr Skálavík og búsettist har. Tey eiga trý børn: Axel, sum býr í Hirtshals, Erla, sum býr á Nykøbing Falster, og Terji, sum býr á Sandi.

Sonja arbeiddi á flakavirkinum Sólarris í Skopun, áðrenn hon 1. mai 1979 fekk starv á Eirargarði.

Sonju verður ynskt hjartaliga tillukku við starvsdegnum.

**Børnini**

Fyri 30 árum síðan:

## Største flogfar sum nakrantíð hevði lent í Vágum

*Propellflogfarið hjá Mærsk Air (v.m.) og Boeing 737 flogfarið hjá Britannia Airways, ið var største flogfar, sum nakrantíð hevði lent í Føroyum í 1974. Fremst á myndini síggjast tveir bilar, ein Wolseley og ein Toyota Crown.*

*Kelda: Myndaárbókin –árið ið fór 1974*



Týsdagin 30. apríl 1974 kom eitt Boeing 737 ferðamannaflogfar frá enska flogfelagnum Britannia Airways til Føroya.

Ferðin úr Kastrup til Vágar tók tveir tímar, og við flogfarinum vóru umleið 30 starvsfólk og teknikarar hjá SAS, Mærsk Air, Danair og ferðslumyndugleikunum.

Flogfarið var tað største, ið nakaratíð hevði lent í Vágum. Tað hevði tveir jetmotorar og kundi taka 130 ferðafólk.

Endamálið við ferðini var at gera eina royndarflúgving og vita, hvussu væl hetta flogfar klárar lending og start á flogvøllinum í Vágum, og um tað møguliga kundi nýtast til framtíðar flúgving upp á Føroyar.

Áðrenn flogfarið fór avstað aftur, vóru tríggjar royndir gjørdar viðvíkjandi fráfaring og lending undir ymsum umstøðum. Royndirnar eydnaðust sera væl.

### Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri stóru samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi, sonur og bróðir

**Jacob Wang Andreasen**

doyði og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*

**Erla og børnini**

### Dagurin

**Mai,** Nevndur eftir rómversku gudinnuni Maju, sum var gudinna fyri gróðri og grøði. Summir halda, at navnið kemur av latínska orðinum majores, teir gomlu, ið var navnið á gamla senatinum í Róm.

**1. mai. Valborgarmessa**. Hildin til minnis um enska kongsdóttur og nunnu, sum seinni gjørdist abbadissa í kleystrinum Hildesheim í Týsklandi. Hon doyði í 779. Valborgarnátt varð hildin mikil várveitsla í Norðurlondum, og tað er ta náttina, at trøllkonur ríða at Bloksbjørgum.

Germanskt navn, ið merkir *vald* og *vernd*.

1. mai er arbeiðaradagurin, sum varð hildin á fyrsta sinni í París í 1889.

**2. mai. Atanasius**, deyður í 373. Patriarkur í Aleksandria. Var kendur kirkjulærari, og hevur sett saman eina trúarjáttan, sum varð samtykt í Nikæa í 323, og sum ber navn hansara.

**3. mai. Krossmessa.** Var hildin til minnis um, at keisarinnan Helena, mamma Konstantin keisara, fann kristi kross. Hon doyði í 329.

Krossmessusnertur er knappligt illveður, sum kann bresta á um hetta mundið.

Í 1943 var eitt fólkatingsval í Føroyum, sum varð rópt krossmessuvalið.

*Símun av Skarði var føddur hendandaginí 1872.*

### 80 ár

Mánadagin 3. mai verður Jona Johansen, Tvøroyri, 80 ár. Hon er burturstødd.

### Brúdleyp

Í dag, 1. mai, kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Brynhild D. Hellisdal og Heri Ellendersen. Veitslan verður fyri innbodnum í kantinuni í Hoydølum.



**Suzuki GS 500, 4 cyl.**
· Árg 1978
· Km. uml. 36.000.
· Er skrásett sum ellisakfar, og er tí sera bílig at hava.
**Prísuppskot kr. 30.000**

**Tel 44 96 13 og 21 72 00**
**(ring eftir arbeiðstíð)**
**jandan@post.olivant.fo**